Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	29. september 2020
Mál nr.:	20/00538-1
Málsviðgjørt:	jd
Eftirkannað:	23. september 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búnaðargrunn (Fíggjarliga heimildin til at gera antikvariska serskipan í Koltri verður longd til 2025)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búnaðargrunn
(Fíggjarliga heimildin til at gera antikvariska serskipan í Koltri verður longd til 2025)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2013, løgtingslóg nr. 24 frá 30. mars 2015 og løgtingslóg nr. 80 frá 22. mai 2015, verður í § 6 c, stk. 1 "2020" broytt til: "2025".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Við løgtingsmáli nr. 67/2014 varð løgtingslóg um Búnaðargrunn broytt soleiðis, at 5,0 mió. kr. av innistandandi upphæddini pr. 1. januar 2013, markað til Royndarstøðina í Hoyvík, skuldu brúkast til eina antikvariska serskipan fyri Koltur. Henda serskipan skuldi gerast í árunum 2014-2020. Av samlaðu játtanini upp á 5,0 mió. kr. eru uml. 2,1 mió. kr. eftir.

Komið er ikki á mál við at gera hesa antikvarisku serskipan, og neyðugt er tí at leingja tíðarskeiðið, ið er ásett í § 6c, frá 2020 til 2025, so heimild er at brúka ta upphæddina, ið eftir er.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi áseting í § 6c, stk. 1, í løgtingslóg um Búnaðargrunn, fer heimildin at brúka peningin, ætlaður til antikvarisku serskipanina í Koltri, úr gildi í ár.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Uppskotið hevur til endamáls at leingja heimildina at gera antikvariska serskipan fyri Koltur til 2025. Longra tíðarskeiðið verður mett neyðugt, tí arbeiðið at gera hesa skipanina tekur tíð, og tí má játtanin úr Búnaðargrunninum eisini kunna nýtast í longda tíðarskeiðinum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Víst verður til pkt. 1.1., 1.2. og 1.3.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til almenna hoyring, men er lagt fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið og Búnaðargrunnin, sum ikki hava viðmerkingar til uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landið, tí talan er um pening, sum frammanundan er játtaður til endamálið. Umsitingin á Tjóðsavninum umsitur játtaða stuðulin uttan eyka kostnað.

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur hvørki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Hoyvíkssáttmálin javnsetur fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Íslandi við fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Føroyum. Hetta hevur kortini ikki týdning í hesum máli.

Aðrir viðkomandi millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan, sbr. *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention*, og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sbr. *Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.*

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at uppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrinum ella kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna

Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Fíggjarliga heimildin at gera antikvariska serskipan fyri Koltur verður longd til 2025. Longra tíðarskeiðið verður mett neyðugt, tí arbeiðið at gera hesa skipanina tekur tíð, og tí má játtanin úr Búnaðargrunninum eisini kunna nýtast í longda tíðarskeiðinum.

Til § 2
Áseting um gildiskomu. Ásett verður, at henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 29. september 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Búnaðargrunninum